## ISPS-venjing umborð á Norrønu

Í morgun boðaði Smyril Line frá, at skipað fór at verða fyri sonevndari ISPS-venjing umborð á Norrønu í morgun. Felagið læt fólk vita, at eitt ávíst virksemi fór at verða kring um skipið fyrrapartin. Tey, sum kanska løgdu til merkis, at okkurt var á vási, skuldu bert vita, at talan er um venjing. Felagið sigur, at venjingin skal tryggja, at mannagongdir í sambandi við kreppustøðu á Norrønu virka sum ætlað. Haraftrat verður eftirmeting, so Smyril Line og avvarðandi myndugleikar saman kunnu betra um mannagongdirnar, um neyðstøða skuldi tikið seg upp.




## Føroyar á ovastu rók

Altjóða havfrøðingar hava ratað Føroyar til eitt fyrstapláss í spurninginum um burðardygga fiskiveiði. Saman við Falklandsoyggjunum fáa Føroyar bestu plasering. Føroya Reiðarafelag sigur á síni heimasíðu, at hetta er hin størsta og mest umfatandi kanningin um burðardygga veiði, sum nakrantíð er gjørd. Kanningin, sum byggir á seks kriteriir, varð almannakunngjørd í tíðarritinum, Plos Biology, í summar. Tey seks kriteriini eru: Vísindaligt mótstøðuføri, gjøgnumskygni í politisku avgerðunum, hvussu lógirnar verða hondhevaðar, stuðul, veiðiorka og útlendsk fiskiveiða.

# Stórur dagur hjá Frel



*Gingið varð í skrúðgongu úr salinum í Tórsgøtu niðan á nýggju hølini á Dalavegi 1*

**Frelsunarherurin í Føroyum hátíðarheldur í hesum døgum 85 ára føðingardag, og samstundis tekur hann nýggju og snotiligu hølini á Dalavegi 1 í nýtslu**

**FØÐINGARDAGSHALD**

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Tað eru nú tíggju ár síðani, at Frelsunarherurin setti á stovn Herbergið. Tað hevði leingi verið ein tørvur á einum slíkum stovni, men meðan land og kommunur nýttu tíðina at kjakast um, hvørt tørvurin var har og hvør í so fall hevði ábyrgd at »herberga« teimum borgarunum, sum komu so tvørt fyri, at teir gjørdust heimleysir, so valdi Frelsunarherurin at gera nakað við málið.

Í sambandi við, at Frelsunarherurin lat upp nýggju hølini á Dalavegi 1, har sum Kaggin helt til, var hátíðarløta, har millum onnur Jógvan Arge, formaður í Mentamálanevndini hjá Tórshavnr býráð, førdi fram røðu.

- Frelsunarherurin hevur sanniliga sett sín dám á Havnina tey 85 árini, hann hevur virkað her. Hjá okkum, sum eru uppvaksin í býnum, er hann fastur táttur í huganum, og hugsa vit um miðbýin, so síggja vit altíð Frelsunarherin og hansara fólk fyri okkum, segði Jógvan Arge í røðu síni.

Hann nam við Frelsunarherin sum instutión í býnum, og hvussu felagsskapurin gjøgnum árini hevur sett sín dám á miðbýin við sínum møtum, sangi og talum.

### Hjartarúm

- Vit vita eisini um tað vælgerðararbeiði av ymsum slag, sum Frelsunarherurin ger kring heimin. Á okkara leiðum kenna vit einamest til Herinn í Reykjavík, har mangur føroyskur fiskimaður gjøgnum árini hevur gist heitt og fjálgt og bíliga, og arbeiðið á gøtuni í Oslo, har ótryttiliga virksemið hjá landsmanninum Njál Djurhuus og konu hansara fekk kongaliga viðurkenning, segði Jógvan Arge.

Hann nevndi eisini, at býráðið eins væl og vanligi borgarin hevur verið sera fegin um tað arbeiði, ið Frelsunarherurin hevur gjørt hesi mongu árini.

- Vit hava verið sera fegin um tann nýggjasta táttin hjá Frelsunarherinum í Føroyum við herberginum og dagtilhaldinum her í húsunum. Føroyskir myndugleikar hava helst verið nakað trekir at viðurkenna, at eisini í okkara samfelag kunna fólk koma soleiðis fyri, at tey gerast heimleys og hava brúk fyri hjartarúmi eins og húsarúmi, segði Jógvan Arge.

Tað verður sagt, at Frelsunarherurin byrjaði sítt virksemi uttanfyri vertshúsið "The Blind Beggar" í London í 1867, tá tykkara stovnari William Booth fór undir sítt arbeiði millum arbeiðsleys og alkoholmisbrúkarar.

- Sostatt kunna vit siga, at tað, sum vit hátíðarhalda her í dag, er í fullum samljóði við søguna og endamálið hjá Frelsunarherinum. Og tað er ongin ivi um, at hetta er ein stórur dagur ikki bert fyri tykkum, men eisini fyri Havnina og allar Føroyar, segði Jógvan Arge at nýggja Herbergið á Dalavegi 1 varð tikið í nýtslu leygardagin.